# leygardagin



*Á 1. hædd er stórur matvøruhandil, sum hevur limaskap í Samkeyp*
*Mynd: Dagfinn Olsen*



*Stórur og stásiligur stendur nýggi handilsbygningurin mitt í Vági. Leygardagin letur Torgið upp*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

ar og stovnar, eru eisini vælkomin at nýta torgið, sigur Arni Brattaberg.

### Góðir møguleikar og stórur áhugi

- Vit hava roynt at hava viðurskiftini uttanfyri á sama høga støði, sum viðurskiftini innan. Í samráð við grannan, Føroya Banka, hava vit gjørt parkeringsøki á teirra øki, so í alt eru eini 25 parkeringspláss, sigur Arni.

Arni fegnast um, at stórur áhugi hevur verið millum manna, meðan húsini hava staðið í gerð.

- Og nógv hava hjálpt til, og tað eru vit takksom fyri, sigur Arni.

Vit vóna at kunna liva upp til høgu vónirnar, ið fólk hava. Men vert er at leggja sær í geyma, at hetta er ikki bert handilsmiðstøð fyri Vágbingar, men fyri alla Suðuroynna, sigur Arni Brattaberg.

### Lata upp leygardgain

Leygardagin 14 juni letur Torgið so upp. Dyrnar fara upp klokkan 10:00 og ymiskt er á skránni hendan stóra dagin. Enn er alt ikki endaliga fastlagt, men stór mótasýning við klæðum frá Sirri og Kansas verður á skránni.

- Vit vóna at kunna skipa fyri tiltøkum javnan, sigur Arni Brattaberg.

Hann játtar, at tað er við góðum treysti, at hann og Rakul fara undir hesa ætlanina.

- Tað er altíð so, at ein byggir í góðum tíðum, men so koma aldudalar. Men vit halda, at tørvur er á hesum, og tað er eisini tað, ið vit hoyra frá fólki. Vit trúgva uppá tað, hóast íløgan er stór, sigur Arni, sum sigur, at tað hevur verið ein strævin tíð, og at hann stundum hevur havt tekningar og ætlanir við til songar, men hann fegnast um góðu hjálpina, sum familja og vinir og fólk annars, hava sýnt.

Nú eru snøklarnir eftir at fáa á pláss, innan stóra dagin leygardagin, tá Torgið letur upp.



*Á ovaru hæddini húsast tríggir handlar á 300 fermetrum*
*Mynd: Dagfinn Olsen*